# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B  P.O.Box 1134  FO-110 Tórshavn  Faroe Islands

Tlf. +298 317811  Fax +298 314489  E-mail: info@arbeidseftirlit.fo


***Skrásetingar nr.:***

**R-C009-1**

# Reglugerð
# um
# flytbarar persónlyftarar við arbeiðskurv

Sambært løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum, § 17, stk. 2, hevur Landsstýrið heimilað Arbeiðseftirlitinum at fyriseta hesa reglugerð.

## KAPITTUL 1

### *Øki og lýsing.*

**§ 1.** Reglugerðin fevnir um allar flytbarar persónlyftarar við arbeiðskurv. Undantiknir eru persónlyftarar til sløkki- og bjargingararbeiði, hesir koma tó undir reglurnar, um teir verða nýttir í almennari ella privatari vinnu.

Stk. 2. Verður onnur útgerð, so sum mobilkranar, lastbilkranar ella entrepenørmaskinur, útgjørdar við arbeiðskurv fastgjørdari til flytbaran útleggjara, skal útgerðin trygdar- og heilsuliga verða minst líka trygg og verða útgjørd sum vanligur persónlyftari, eftir hesi reglugerð

Stk. 3. Flytbarir persónlyftarar við arbeiðspalli verða brúktir til at lyfta persónar og tilfar í eina hóskandi arbeiðshædd, fyri at útinna tíðaravmarkað arbeiði, so sum viðlíkahald og umvælan. Persónlyftarirnir eru sum oftast festir beinleiðis á motordrivið akfar ella á flytbaran undirvogn.

Stk. 4. Allir persónlyftarar skulu lúka treytirnar, ið ásettar eru í kunngerðini nr. K-E015-1 um innrættan av tekniskum hjálpartólum. Eftir hesum reglum hevur Arbeiðseftirlitið ásett fylgjandi:

## KAPITTUL 2

### *Nýtsluleiðbeining.*

**§ 2.** Útvegarin skal við sølu, leigu ella láni, altíð lata eina skrivliga nýtsluleiðbeining á føroyskum máli (danskt, norskt og svenskt mál kann loyvast), ið greiðir frá handfaring, nýtslu og viðlíkahaldi.
Stk. 2. Týdningarmikil brot úr leiðbeiningini skulu verða sett í eftirlitsbókina fyri viðkomandi persónlyftara.


***Lógarheimild:***
§ 17, stk 2 í løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E015-1 um innrætting av tekniskum hjálpartólum frá 4. september 1995.

***Útgivið fyrstu ferð:***

**1. januar 1998**

***Seinastu broytingar:***


## KAPITTUL 3

### *Fráboðan og eftirlitsbók*

**§ 3.** Flytbarur persónlyftari má ikki takast í nýtslu sum nýggjur, fyrr enn hann er fráboðaður Arbeiðseftirlitinum. Nýggj fráboðan skal gerast, áðrenn nýtslu, í samband við eigaraskifti ella umbygging og umvæling av týdningi.

Stk. 2. Eigarin hevur skyldu til at senda fráboðanina til Arbeiðseftirlitið, og skal avrit av fráboðanini finnast í eftirlitsbókini fyri viðkomandi persónlyftara. Fráboðanin skal gerast á eitt serligt fráboðanarskjal, ið fæst frá Arbeiðseftirlitinum.

**§ 4.** Til allar flytbarar persónlyftarar og útgerð, ið kemur undir reglurnar í hesi reglugerð, skal finnast ein eftirlitsbók, ið skal goymast á ella nærhendis útgerðini.

Stk. 2. Eftirlitsbókin skal lýsa persónlyftaran við viðkomandi upplýsingum, t. d. framleiðslumerki, framleiðarans navn og bústað, framleiðslunummar, framleiðsluár, mest loyvdu last (SWL). Um-framt hesar upplýsingar skal í eftirlitsbókini verða:

1. Váttan um støðuroyndir,
2. Váttan um lastroyndir,
3. Váttan um fráboðan,
4. Váttan um beriútgerðina,
5. Upplýsingar um feilir, trot og eftirlit,
6. Upplýsingar um umvælingar, ið hava týdning fyri trygd,
7. Upplýsingar um útskifting av beriútgerð v. m., og
8. Upplýsingar um boð frá Arbeiðseftirlitinum viðvíkjandi útgerðini.

## KAPITTUL 4

### *Lastroynd*

**§ 5.** Í samband við fráboðan av persónlyftara skal lastroynd verða framd. Váttan fyri lastroyndina skal goymast í eftirlitsbókini fyri viðkomandi lyftara.

Stk. 2. Persónlyftarar skulu lastroynast við eini støðuroynd (statiskari lastroynd) við minst 50% yvir mest loyvdu arbeiðslast (SWL), tó minst 100 kg yvir mest loyvdu arbeiðslast, um ikki annað er fyrisett av framleiðaranum.

Stk. 3. Eisini skal verða framd ein rørsluroynd (dynamisk lastroynd), við 25% yvir mest loyvdu arbeiðslast (SWL).

## KAPITTUL 5

### *Innrættningur*

**§ 6.** Arbeiðskurv skal til allar síðir hava eina 1 metur høga girðing. Girðingin kann verða av hóskandi plátutilfari, ella av haldgóðum rimaverki, við minst einum knælista og einum 150 mm høgum fótlista, ið er tættur niður á dúrki. Sum trygd fyri at persónar ella amboð ikki skulu detta niður, kann rimaverkið verða klætt við plátum ella haldgóðum neti.

Stk. 2. Hondlisti skal verða 10 cm innanfyri og 10 cm omanfyri girðingina. Portrið í girðingini má ikki kunna latast upp úteftir og skal hava sjálvvirkandi lás.

Stk. 3. Tað skal verða møguligt at festa falllínu í arbeiðskurvina. Gólvið skal verða glíðitrygt og hava hol til frárensl av vatni. Kurvin skal í øllum arbeiðsstøðum verða vantrøtt

Stk. 4. Kurvin skal verða løtt at koma uppí. Er hæddin upp til kurvina hægri enn 500 mm yvir jørð ella last, skal trappa ella stigi verða festur á kurvina.

Stk. 5. Størst loyvda last skal verða uppmerkt á einum sjónligum stað á kurvini. Lastin skal verða lýst sum **mest loyvda vekt í kg** og sum **mest loyvda tal av persónum + onnur vekt í kg**. Vektin av einum persóni verður rokna til 85 kg.

Stk. 6. Er tað ein treyt fyri nýtslu, at akfar ella viðfestivognur stendur vatnrættur, skulu hesi verða útgjørd við loddi, vatnbretti ella aðrari mátiútgerð til kanning av halli. Møguleiki skal verða fyri at stilla hallið.

Stk. 7. Er støðufesti treytað av stuðlabeinunum, skal arbeiðskurvin ikki gerast virkin fyrr enn stuðlabeinini eru virkin.

Stk. 8. Persónlyftarar, ið verða nýttir har ferðsla er, skulu hava gult ávaringar blunkljós. Partar av lyftaranum, t.d. sjálv kurvin og stuðlabeinini, sum kunnu koma soleiðis fyri, at teir kunnu verða til skaða, eiga at verða merktir við gulum og svørtum ávaringarstrípum.

## KAPITTUL 6

### *Rørsluknøttar.*

**§ 7.** Stýringin av rørslunum á arbeiðskurvini, skal tá arbeitt verður, bert fara fram í kurvini. Knøttarnir skulu virka soleiðis, at kurvin steðgar, tá knøttarnir verða sleptir (null - søkjandi).

Stk. 2. Knøttarnir skulu verða festir og innrættaðir soleiðis, at óynskt rørsla ikki kemur fyri. Sum dømi kunnu knøttarnir verða niðurfeldir ella hava kraga.

Stk. 3. Vælskiljandi leiðbeining skal verða við knøttarnar, sum tekin ella skrift.

Stk. 4. Møguleiki skal verða at avbróta orkukelduna, soleiðis at óviðkomandi nýtsla verður forðað. Á elektriskum lyftarum skal neyðsteðgiknøttur verða við rørsluknøttarnar.

Stk. 5. Á akfari ella viðfestivogni skal møguleiki verða fyri, um neyðugt, at lækka kurvina. Hesin møguleiki skal tryggjast ímoti nýtslu av óviðkomandi og skal týðiliga merkjast við tekni ella skrift.

## KAPITTUL 7

### *Nýtsla*

**§ 8.** Nýtsluleiðbeiningin frá útvegara skal fylgjast.

Stk. 2. Tá persónlyftarin verður nýttur, og har stuðlabeinini verða sett niður, skal lendið verða haldgott og kunna bera neyðugu vektina. Neyðugt kann verða við tiltøkum fyri at styrkja lendi. Til nýtslu har ferðsla er, skulu avmerkingar gerast eftir ferðslulógini ella eftir ávísing frá løgregluni.

Stk. 3. Tað er sera neyðugt at verða varin har el-kaðalar eru.

Stk. 4. Persónar í kurvini skulu, har tað er neyðugt, verða fastgjørdir við trygdarseðlum og trygdarlínu. Tá rørslur verða framdar við kurvini skal ansast væl eftir, at persónar ella annað ikki kemur í vanda ella klemmu.

Stk. 5. Persónlyftari kann bert nýtast, tá fólk eru nærhendis, ið frá í neðra, kunnu lækka kurvina, í eini neyðstøðu. Persónar mugu ikki fara úr kurvini, tá hendan er í lyftari støðu.

Stk. 6. Eingin skal verða í kurvini tá flutt verður. Tað eru tó tvey undantøk:

1. Akfør og viðfestivognar, har kurvin bert kann lyftast loddrætt, og har støðufesti er nøktandi uttan stuðlabein, kunnu flytast í upplyftari støðu, við mannaðari kurv, tá:
   - undirlagið eru javnt og burðardygt
   - kurvin, í mesta lagi er 2 metrar yvir lendinum
   - hæddin yvir kurvini minst er 2 metrar

2. Motorrikin akfør sum hava trýrættaðan rørslumøguleika, kunnu flytast í upplyftari støðu, við mannaðari kurv, tá fylgjandi krøv verða fylgd:
   - tað skal í brúkaravegleiðingini frá útvegaranum, verða váttað at støðufesti á persónlyftaranum er nøktandi til hesa nýtslu,
   - tað skal, sjálvvirkandi, verða tryggjað, at kurvin ikki kann førast út á vandamikil øki, ið krevja stuðlabein,
   - mest loyvda ferðin er 5 km/t,
   - nøktandi samband, møguliga radiosamband, skal verða millum føraran í akfarðinum og persónin í kurvini,
   - undirlagið eru javnt og burðardykt,
   - førarin skal hava frítt útsyni.

## KAPITTUL 8

### *Ung undir 17 ár.*

**§ 9.** Ung fólk undir 17 ár mugu ikki nýtast til arbeiði í kurv, tá arbeiðshæddin er meira enn 5 metrar yvir lendið.

## KAPITTUL 9

### *Viðlíkahald og 12 mánaðarkanning v.m.*

**§ 10.** Persónlyftarin skal viðlíkahaldast, soleiðis at hann altíð er í góðum og forsvarligum standi. Leiðbeiningar frá útvegaranum og galdandi reglur frá Arbeiðseftirlitinum um viðlíkahald og kanning skulu fylgjast.

Stk. 2. Verða álvarsamir feilir ella manglar staðfestir, skal persónlyftarin takast úr nýtslu til brekini eru umvæld.

**§ 11.** Umframt at omanfyri nevndu krøv altíð skulu verða fylgd, skulu persónlyftarir minst eina ferð í hvørjum álmanakkaári, til kanning hjá sakkønum virki, við serligum sakkunnleika á hesum øki, og sum er góðkent av Arbeiðseftirlitinum, til hetta arbeiðið. Sí reglugerð um góðkenning av

virkjum, at kanna og umvæla persónlyfterar (R-C009-2).

Stk. 2. Kanningin skal gerðast eftir teimum reglum sum framleiðarin setir, tó skulu fylgjandi umráði altíð kannast: 1) mekaniskir lutir, so sum útleggjari, boltar, ketur, búsningar, bremsur, v. m., 2) trygdarútgerð, 3) rørsluknøttar, 4) drívmegi t.v.s. motorar - elmotorar, 5) hydraulikkur, 6) el-útgerð og 7) lastroynd. Persónlyftarar, sum verða nýttir til el-arbeiði skulu í samband við kanningina kanna el-avbyrgingar mótstøðua (isolatións mótstandin).

Stk. 3. Umvæling, viðlíkahald og kanning má bert fara fram, tá persónlyftarin er tikin úr nýtslu.

Stk. 4. Virkið, ið framt hevur 12 mánaðarkanningina, gevur eina váttan, áðrenn lyftarin aftur fer í vinnu. Váttanin hevur gildið 12 mánaðir fram, um so er at einki óvantað hendir.

Stk. 5. Eigarin av lyftarinum hevur ábyrgdina av, at avrit av váttan og kanningarlistum verða latin Arbeiðseftirlitinum so skjótt kanningin er liðug.

Stk. 6. Tað er skylda eigarans, at avrit av dagførdum váttanum og kanningarlistum v. m., til eina og hvørja tíð finnast í eftirlitsbókini fyri viðkomandi lyftara.

Stk. 7. Omanfyri nevnda kanning skal eisini fara fram av brúktum persónlyftarum, áðrenn nýggjur eigari tekur lyftuna í nýtslu.

Stk. 8. Arbeiðseftirlitið kann, í serligum føri, krevja at lyftarin kemur undir 10 ára høvuðs-kanning.

**§ 12.** Arbeiðseftirlitið hevur eftirlit við persónlyftarum, fyri at staðfesta um fari er fram eftir galdandi reglum. Arbeiðseftirlitið fremur eftirlitini uml. 24. hvønn mánaða.

Stk. 2. Fyri eftirlit og royndir v.m., ið Arbeiðseftirlitið ger, í samband við persónlyftir, skal eigarin, ella tann, ið ábyrgdina hevur av nýtsluni, lata eitt gjald, ið er ásett av Landsstýrinum.

## KAPITTUL 10

### *Gildi fyri reglugerðina.*

**§ 13.** Hendan reglugerð kemur í gildi 1. jannuar 1998.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, 15. desember 1997.

Eli Davidsen, stjóri (sign.)